Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 34

ISSN 0907-905X

Nr. 111 31. august 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 85 frá 9. juni 2009 um „skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008, og reglur um alment próvskeið í føroyskum" verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í heitinum verður aftaná: „sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008" sett: „ella seinni,"

2) Í § 52 stk. 1 verður aftaná: „sum eru farin undir lestur fyri 1. august 2008" sett: „ella seinni.",

3) Í § 52 verða stk. 3 og stk. 4 strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, 31. august 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 112 2. september 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 105 frá 18. august 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 7 a verður sum stk. 2-8 sett:
„*Stk. 2.* Hóast framman fyri standandi kunnu eigarar av fiskiførum avhenda fiskidagar, sbrt. § 14, stk. 1 og 2, fyri eitt ár í senn. Egin kvotupartur, egin árskvota og egin hjáveiðikvota, sbrt. § 15, stk. 1, kann somuleiðis avhendast fyri eitt ár í senn. Farið verður fram eftir vanligu reglunum í hesi lóg.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann við kunngerð áseta, hvussu toskavirðið, sbrt. stk. 1, nr. 7, verður gjørt upp.
*Stk. 4.* Nærstandandi, sbrt. stk. 1, eru hjúnafelagi, foreldur, omma, abbi, børn, barnabørn, systkin og hjúnafelagar hjá børnum, barnabørnum ella systkjum.
*Stk. 5.* Virksemi, har feløg og persónar, sum einsamallir ella saman við nærstandandi, beinleiðis ella óbeinleiðis, høvdu rætt til meira enn mest loyvda ásett í stk. 1, áðrenn henda lóg kemur í gildi, kann halda fram, men kann ikki økjast.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann í serligum førum gera undantak frá ásetingunum í stk. 1.
*Stk. 7.* Broytingar í ognarviðurskiftunum skulu góðkennast av landsstýrismanninum. Ætlaðar broytingar skulu fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn broytingarnar fara fram. Broytast ognarviðurskiftini soleiðis, at eigarar fara upp um hámarkið í stk. 1, kann landsstýrismaðurin krevja, at viðurskiftini koma í rættlag innan ávísa tíðarfreist. Koma viðurskiftini ikki í rættlag, fellur veiðiloyvið burtur.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann í sambandi við viðgerðina av málinum krevja allar neyðugar upplýsingar frá eigarum, nevndarlimum, ráðgevum, virkjum o.ø. um eigaraviðurskiftini og um veiðu fyri at tryggja, at treytirnar í stk. 1 eru loknar.“

2) Í § 29, stk. 1 verður

| | | |
|---|---|---|
| „Bólkur 3: | Línuskip yvir 110 tons | 2.657 fiskidagar“ |
| broytt til: | | |
| „Bólkur 3: | Línuskip yvir 110 tons | 2.567 fiskidagar“ |

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. september 2011.

Tórshavn, 2. september 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 47/2011

Nr. 113 5. september 2011

# Kunngerð
# um
# gjøld fyri umsiting og eftirlit sambært lógini um umhvørvisvernd v.m.

Við heimild í § 35 a í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, § 36, stk. 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum og § 3, stk. 8 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, verður ásett:

**§ 1.** Almennar og privatar fyritøkur, herundir kommunur, skulu endurrinda útreiðslur, sum Umhvørvisstovan hevur í sambandi við viðgerð av málum um loyvi og góðkenning v.m., og av eftirlitinum við, at ásetingarnar í hesum lógum verða hildnar, herundir treytir ásettar í loyvum og góðkenningum.
*Stk. 2.* Almennar og privatar fyritøkur, herundir kommunur, skulu endurrinda tær útreiðslur, ið Umhvørvisstovan hevur í tí einstaka málinum, herundir brúk av uttanhýsis ráðgevum, starvsstovukanningum, brúk av tænastum frá øðrum myndugleikum, tænastuferðum uttanlands o.t.

**§ 2.** Gjaldið, ið skal rindast Umhvørvisstovuni eftir § 1, stk. 1, verður roknað við støði í tímanýtslu og tímakostnaði ella sum eitt fast ásett gjald fyri viðgerð av ávísum umsóknum um loyvi og góðkenning, sum ásett í fylgiskjali til hesa kunngerð.
*Stk. 2.* Útreiðslur, sum Umhvørvisstovan hevur eftir § 1, stk. 2, skulu endurrindast eftir rokning.

**§ 3.** Umhvørvisstovan fyriskipar uppkrevjingina av gjøldunum.
*Stk. 2.* Í uppkravinum skal útgreinast, hvussu komið er fram til upphæddina.
*Stk. 3.* Gjøldini skulu rindast í seinasta lagi tann 25. í mánaðinum eftir, at tey eru uppkravd.
*Stk. 4.* Verða gjøld eftir § 1 ikki goldin, kunnu hesi krevjast inn við panting, sambært ásetingunum um hetta í skattalógini.
*Stk. 5.* Tey í fylgiskjalinum ásettu gjøld verða árliga javnað við 3% og rundað til nærmasta heila krónutal. Landsstýrismaðurin ásetur við kunngerð javnaðu gjøldini í seinasta lagi 1. januar á hvørjum ári.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis verður kunngerð nr. 31 frá 8. mars 2001 um gjøld eftir havumhvørvisverndarlógini, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, sett úr gildi.

Innlendismálaráðið, 5. september 2011

**John Johannessen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

**Fylgiskjal**

**A. Gjøld, roknað við støði í tímanýtslu og tímakostnaði**

| Tíðarbil | Teknikari | Akademikari |
|---|---|---|
| 07:00 - 17:00 | 350 kr. um tíman | 500 kr. um tíman |
| 17:00 - 24:00 | 525 kr. um tíman | 750 kr. um tíman |
| 24:00 - 07:00<br>leygar-, sunnu- og halgidagar | 750 kr. um tíman | 1.000 kr. um tíman |

**B. Eftirlitsgjøld fyri svimjihylar**

4.000 krónur fyri hvørja høll, umframt 1.000 krónur fyri hvønn hyl ella bað.

Nr. 114 5. september 2011

**Kunngerð**
**um**
**broyting í valstøðum**

Við heimild í § 21 í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya Løgtings við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

**§ 1**

Í fylgiskjali til løgtingslógina verða valstøðini Miðvágur og Sandavágur strikað. Giljanes verður valstað fyri bygdirnar Miðvág, Vatnsoyrar og Sandavág.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Innlendismálaráðið, 5. september 2011

**John Johannessen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

Nr. 115 5. september 2011

**Kunngerð**
**um**
**at seta í gildi lóg um ítróttavedding**

Við heimild í § 14, stk. 1 í løgtingslóg nr. 51 frá 17. mai 2011 um ítróttavedding verður ásett:

**§ 1.** Løgtingslóg nr. 51 frá 17. mai 2011 um ítróttavedding kemur í gildi 15. september 2011.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Innlendismálaráðið, 5. september 2011

**John Johannessen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

Nr. 116 5. september 2011

**Kunngerð**
**um**
**góðkenningargjald**

Við heimild í § 5 í løgtingslóg nr. 51 frá 17. mai 2011 um ítróttavedding verður ásett:

**§ 1.** Avtalur, ið Sp/f Ítróttarvedding ger við veddingafeløg sambært § 4 í løgtingslóg um ítróttavedding, skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

*Stk. 2.* Fyri góðkenningina verður latið eitt gjald á kr. 3.700.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi 15. september 2011.

Innlendismálaráðið, 5. september 2011

**John Johannessen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705